Bilar

Nr. 128 • fríggjadagur • 8. juli 2005 • 79. árg.



# Toyota Aygo kemur í heyst




*Toyota bilurin eitur Aygo, ið merkir "I go", og verður hann tann fyrsti á marknaðinum.*

**Toyota Aygo er ein bilur sum Toyota og PSA (Citroën og Peugeot) gera saman á eini felags verksmiðju í Kekkia. Motorjournalistar hava royndarkoyrt bilin, ið fæst við 3 og 5 hurðum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað er við stórum spenningi, at bíða hevur verið eftir hesi felags verkætlan frá Toyota og PSA (Citroën og Peugeot). Toyota bilurin eitur Aygo, ið merkir "I go", og verður hann tann fyrsti á marknaðinum.

Hóast bilarnir verða gjørdir á sama samlibandi, verða teir ikki heilt eins at síggja til. Allir hava teir hvør síni sereyðkenni. Tveir ymiskir sera framkomnir og orkusparandi motorar verða at velja í millum: 1,0 bensin og 1,4 diesel. Toyota Aygo diesel kemur fyrst í 2006.

Aygo er nakað minni enn t.d. Toyota Yaris. Motorjournalistar hava royndarkoyrt bilin í nógvu ferðsluni í italska høvuðsstaðnum Rom, og eru teir samdir um, at talan er um ein umhvørvisvinarligan og orkusparandi býbil, sum er lættur at koyra við t.d. elektromekaniskari servostýring. Aygo fæst við bæði 3 og 5 hurðum. Viðførisrúmið er 139 litrar, men við at leggja baksetrini niður, verður tað væl størri.

Bilarnir verða gjørdir á eini felags verksmiðju í Kolin, 40 km eystan fyri kekkiska høvuðsstaðin Prag. Citroën C1 og Peugeot 107 koma hendan vegin í fyrst í komandi ári.

Aygo varð frumsýndir á Genéve Motorshow í mars 2005. Á heimasíðuni hjá Reyni Service stendur at Aygo kemur hendan vegin í oktober. Prísin vita vit tó einki um enn.

## Toyota Aygo 1,0 VVT-i

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,0 litur 3 syl. bensin 68 hk |
| 0-100 km/t | 14,9 sek |
| Bensinnýtsla | 21,7 km/l (blandað koyring) |
| Dekkstødd | 155/65-14 |
| Stødd og vekt | |
| Longd | 340,5 cm |
| Breidd | 161,5 cm |
| Hædd | 146,5 cm |
| Eginvekt | 890 kg |
| Viðførisrúm | 139 litrar |
| Søluumboð | Reyni Service<br>Vegurin Langi<br>FO-188 Hoyvík<br>Tel. 35304<br>www.reyniservice.fo |

# Nýggjur Ford Galaxy í 2006

**Konseptbilurin Ford SAV verður møguliga avloysarin fyri núverandi Ford Galaxy. Bilurin kemur eftir ætlan á marknaðin í 2006 við sitiplássum til fimm vaksin og tvey børn. Møguliga eisini í eini longri útgávu við sitiplássum til sjey vaksin**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Ford arbeiða í løtuni við konseptbilinum SAV, sum møguliga verður avloysarin fyri Ford Galaxy, ið higartil hevur verið gjørdur í Portugal saman við VW Sharan og Seat Alhambra.

Ford SAV konseptbilurin er ein 5-persóna MPV við liðiligari innrætting eins og Ford Focus C-Max, men í endaligu útgávuni verður helst talan um ein 5+2 við barnasetrum aftast. Møguliga verður eisini ein longri útgáva við sitiplássum til sjey vaksin.

Motorarnir verða bæði bensin og diesel. Bensinmotorarnir verða frá 2,0 litur 4 syl til 3,0 litur V6 við yvir 200 hk, meðan dieselútgávurnar verða 2,2 litur TDCI við umleið 150 hk og 2,7 litur V6 við commonrail og 207 hk.



*Konseptbilurin Ford SAV verður møguliga avloysarin fyri núverandi Ford Galaxy.*

Lesið Sosialin - so eru tit við